


**Nr. 9** *26. apríl 2026* **86. árg.**

# Harrin talar gjøgnum sítt egna Orð

Einaferð, tá ið Ludvig Karlsen talaði í Bjørbekk kirkju, spurdi hann sum vant Harran, hvat hann skuldi tala yvir. Hann fekk tá tekstin frá Jesaja 38, 1–8. Honum dámdi best positivar tekstir, men Harrin er stjórin, og vit skulu bara akta Hann og gera eftir boðunum. Tí kanska situr onkur har, sum júst hevur tørv á hesum boðskapinum. Hann las fyrst tekstin upp, sum í stuttum er um Hizkia kong, sum legðist deyðasjúkur. Jesaja profetur kom til hansara og segði: „So sigur Harrin: Skipa nú fyri húsi tínum, tí at tú fert at doyggja og ikki liva longur.“ Tá vendi hann andlitinum móti vegginum og bað soleiðis til Harrans: „Á, Harri, minst til, hvussu eg havi gingið fyri ásjón tíni í trúfesti og av heilum huga og gjørt tað, sum gott var í tínum eygum!“ Og Hizkia græt sáran. Tá segði Harrin við Jesaja: „Far og sig við Hizkia: „So sigur Harrin, Gud Dávids forfaðirs tíns: Eg havi hoyrt bøn tína og sæð tár tín; sí, eg vil leggja 15 ár aftur at aldri tínum.“

So greiddi Ludvig frá einari heilt serligari hending um henda tekstin: „Eg og Lisa vóru einaferð fyristøðupar fyri eina samkomu í Miðnoregi. Ein dagin, tá ið eg sat á skrivstovuni, sá eg ein mann koma til gongu niðan til mín. Maðurin var blindur, tað sá eg, tí hann hevði hin hvíta stavin, sum er blindastavur. Kona hansara hevði koyrt hann, og hon gekk uttanfyri, meðan hann kom inn.

„Eg komi við einari heilsan frá Harranum,“ segði hann, „tú skalt tala yvir Jes. 38, 1–8. Men eg vil siga tær nakað, sum vit sum familja hava upplivað av hasum tekstinum, tí Harrin sjálvur hevur talað við meg gjøgnum handa tekstin. Hetta er nakað, sum eg sjálvur havi upplivað.

Ein morgunin, tá ið konan er farin til arbeiðis, og eg eri einsamallur inni, ringir telefonin. Eg fari trilvandi yvir til telefonina, og ein rødd sigur: „Hetta er sjúkrahúsið! Beiggi tín hevur verið úti fyri einari ferðsluvanlukku, hann er ákoyrdur og liggur at doyggja. Skalt tú síggja hann, mást tú koma beinanvegin, tað hevur skund!"

Eg fari so trilvandi yvir til eitt skáp at finna mær eina skjúrtu og onnur klæði. So helt eg, at eg mátti hava eitt Guds orð at siga við beiggja mín. Eg havi eina blindabíbliu, men hon er ikki innbundin, men hevur leys ørk. Eg fann eitt ark á stovuborðinum og las: „So sigur Harrin: Skipa nú fyri húsi tínum, tí at tú fert at doyggja og ikki liva longur." (Jes. 38,1). So fari eg inn á sovikamarið eftir pengapunginum, so eg fái goldið fyri bilin, og eg trilvi eftir náttborðinum og finni eitt annað ark. Har stendur: „So sigur Harrin: Skipa nú fyri húsi tínum, tí at tú fert at doyggja og ikki liva longur." Er hetta ikki sama skriftstaðið, sum eg fekk í áðni? Jú, tað var tað, men hetta stóð í 2. Kongabók 20,1. Eg fari so út til telefonina og skal ringja mær eftir einum hýrivogni, tá finni eg aftur eitt leyst ark í telefonbókini, og tað er frá 2. Krýnikubók 32,24, og sanniliga er hatta eisini um Hizkia, sum lá deyðasjúkur. Tá visti eg, at Harrin vildi hava meg at siga hatta við beiggja mín. Hann hevði tríggjar ferðir givið mær hatta skriftstaðið.

Ein sjúkrasystur leiddi meg inn til beiggja mín. „Er tað tú, sum liggur har?" spurdi eg. „Ja," kom tað grælandi frá honum. „Ja, eg havi fingið eitt orð frá Harranum til tín. Harrin sigur: „Skipa nú fyri húsi tínum, tí at tú fert at doyggja og ikki liva longur." Hann vendi sær móti vegginum og fór at gráta. „Men um tú vendir við og biður Harran fyrigeva tær, so vil Hann geva tær 15 ár afturat. Far og bið nú beinanvegin," segði eg. Tvær sjúkrasystrar komu rennandi og skumpaðu meg út, tí tað bleiv sovorðin røringur inni har.

Men líka mikið, nú eru 7 ár farin, og beiggi mín livir í besta lagi. Eg veit sjálvandi ikki, um hann fer at fáa 15 ár afturat. Men beiggi mín vendi um og er frelstur og gongur á møti. Tá ið tú prædikar um handa tekstin, so kanst tú siga frá hasari hendingini, tí hatta havi eg sjálvur upplivað."

*Effie Campbell* umsetti.

# Jesus livdi eitt sparsamt lív

Jesus, sonur Guds, sum livdi í ævigari dýrd hjá Faðiri sínum „... avklæddi seg hana (Guds mynd), í tí at hann tók á seg tænara mynd og gjørdist monnum líkur.“ Fil. 2,7. Hvussu livdi Jesus?

Hann varð føddur í einum fjósi. Fyrsta vøgga hansara var ein krubba. Sum vaksin kom hann saman við fátækum fólkum: fiskimonnum, tollarum, spitølskum, fátækum, einkjum og børnum.

Boðskapur hansara var greiður og lættur at skilja, so einfaldur, at teir klóku, religiøsu leiðararnir ikki kundu torga tær eyðmýkjandi avdúkingarnar.

Jesus hevði ongan tørv fyri luksusi ella marglæti. Hann át og svav, tá ið høvi beyðst. Hóast hann kundi gjørt krav upp á allar teir góðu lutir, lívið hevur at bjóða okkum, valdi hann at siga frá sær ta dýrd og tað skreyt, sum var samanbundið við kongstignina.

Fyrsta reglugerð hansara til fyrsta evangeliserandi bólk sín var: „Takið einki við á ferðini, hvørki stav ella klæðsekk ella breyð ella pengar, ikki heldur skulu tit hava tveir kyrtlar.“ Luk. 9,3.

Eitt av loyndarmálunum við tí stóru framgongdini, sendiboðini hjá fyrstu meinigheitini høvdu, hekk í hesum, um teir høvdu evnini at liva eitt einfalt lív, so sum Kristus livdi.

Mitt í einum boðskapi um pengar minnir Paulus korintmenn um ta sannroynd: „Tí at tit kenna náði várs harra Jesu Krists, at hann fyri tykkara skuld gjørdist fátækur, tá ið hann var ríkur, fyri at tit við fátækt hansara skuldu verða ríkir.“ 2. Kor. 8,9.

Jesu einfalda, uppofrandi og tænandi lívsmynd eigur at vera okkara. „Ikki er ein húskallur størri enn húsbóndi hansara.“ Jóh. 13,6. Ein og hvør, sum heldur fast um ynski at liva eitt lív í luksusi, setir seg sjálvan yvir Harra Harranna.

At seta okkum sjálv hægri enn Frelsari okkara er kanska hin álvarsligasta syndin, vit kunnu gera. Vit hava yvirflóð og oyðsla óneyðugt. Pierson skrivaði í einari av bókum sínum, at um allir teir gull- og silvurlutir og alt hitt nyttuleysa pyntið, sum er at finna inni í heimunum hjá teimum trúgvandi, varð selt, hevði tað verið nóg mikið at bygt 50.000 skip fyri, lasta tey við Bíblium og trúboðarum og givið hvørjari sál evangeliið innan 12 ár.

Men vit eru hjartaleys og líkasæl og hugsa ikki um, hvussu tað skal gangast teimum mongu glataðu í ævinleikanum. Nei, latið okkum fremja Harrans verk. Hann hevur sjálvur sagt: „Savnið tykkum ikki gripir á foldum, har sum mølur og rustur eta, og har sum tjóvar bróta inn og stjala; men savnið tykkum gripir á himli, har sum hvørki mølur ella rustur etur, og har sum tjóvar ikki bróta inn og stjala. Tí at har, sum gripur tín er, har man eisini hjarta títt vera.“ Matt. 6,19–20.

*Effie Campbell* umsetti.

# Frammihjárættindi og heppin

*Peter Haltorp*

Tað týdningarmesta her í lívinum er at blíva kendur við og at kenna Jesus sum vin og bróður. Hatta skilti eg ógvuliga tíðliga gjøgnum góð foreldur og livandi meinigheitslív. Tað kann vera gagnligt og týdningarmikið at vita nógv um ein persón, men at fáa ein persónligan kennskap er nakað heilt annað, tá ið persónurin, sum tú ert komin at kenna, er Vegurin, Sannleikin, Lívið og Ljósið. Hann, sum hevur navnið yvir øllum øðrum nøvnum, sum vann ein ævigan sigur og so nógv meir. Tá kenni eg, at eg havi eini frammihjárættindi og eri heppin.

Harrin hevur ikki givið okkum eina tilráðing, men eini boð um at spreiða boðskapin um Hansara uppreisn, Hansara náði og Hansara afturkomu. Tú hevur ikki skilt evangeliið, hugsi eg, um tú ikki tekur missión í álvara og livir við hesum, sum Hann hevur litið tær upp í hendur, hvønn dag. Bíblian tekur tað sum eina sjálvfylgju, at vit ikki bara hoyra tað, Kristus hevur sagt, men at vit eisini gera tað. Um ikki, so lumpa vit okkum sjálv (sambært Ják. 1). Hvør hevur hug at lumpa seg sjálvan?

*Effie Campbell umsetti*

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 26. apríl | **Tekstur:** | 1. Kong. 17, 1-16 | **Bíbliuorð:** | Luk. 1,37 |
| 3. mai | **Tekstur:** | 1. Kong. 18, 17-39 | **Bíbliuorð:** | 1. Kong 18,39b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 10** ***10. mai 2026*** **86. árg.**

# 143 talar sítt egna mál

Tá ið tann maðurin, sum helt Jesus vera ein svindlara og lumpara, fekk ábyrgdina at skriva næstan helvtina av Nýggja Testamenti, brúkar orðingina **„Í KRISTUSI“** og **„Í HONUM“** 143 ferðir, so mugu hesar málberingarnar vera so nógv meira enn bara orð. Tey eru ein **LYKIL** til tað sigrandi lívið, Paulus livdi.

Eitt **SIGRANDI** lív? Ja, hóast jagstran og tað sum ofta fyri onnur líktist ósigri og tapi. Hevur tú nakrantíð lisið tað, sum Paulus fekk at kenna? Í 2. Kor. 11,23–27 V.D. skrivar hann:

„Eg havi fingið fleiri sløg enn teir, verið oftari í fangahúsi, mangan í deyðavanda. Av jødunum havi eg fimm ferðir fingið fjøruti sløg, frároknað eitt. Tríggjar ferðir eri eg húðflongdur, eina ferð steinaður; tríggjar ferðir havi eg verið fyri skipbroti, eitt samdøgur havi eg verið í sjónum. Nógv havi eg ferðast; eg havi verið í vanda av áum, í vanda millum ránsmenn, í vanda av fólki mínum, í vanda av heidningum, í vanda í býi, í vanda í oyðimørk, í vanda á sjógvi, í vanda millum falskar brøður, í strevi og møði, mangan í náttarvøku, í hungri og tosta, mangan í føstu, kaldur og nakin,“ og Paulus nevnir nógv meira.

Alt hetta hendi honum, meðan hann var **„Í KRISTUSI“**. At vera **„Í KRISTUSI“** merkir ikki, at so sleppa vit undan royndum. Men av tí at Paulus var **„Í KRISTUSI“**, varð hann varðveittur, og kanska vóru tað Paulusar seinastu orð, sum hann har skrivaði í 2. Tim. 4,6–8, meðan hann bíðaði eftir at verða tikin av døgum.

Hann skrivaði til Timoteusar: „Tí at nú er komið at teirri stund, at eg verði ofraður, og tíðin er komin, at eg fari avstað. Eg havi strítt hitt góða stríðið, havi fullrunnið skeiðið, havi

varðveitt trúnna. Og nú liggur rættlætiskransurin goymdur til mín, sum Harrin skal geva mær á hinum degi, hann hin rættvísi dómarin, og ikki mær eina, men eisini øllum teimum, sum hava elskað opinbering hansara."

**Í KRISTUSI ERU VIT VARÐVEITT ALLAN VEGIN HEIM! LEINGIST TÆR EFTIR, AT KRISTUS SKAL KOMA AFTUR?**

*Moses Hansen*
*Effie Campbell* umsetti.

# Heimferðin

Daniel Kort, sum er úr Týsklandi, arbeiddi í nógv ár á einari prentsmiðju á Sri Lanka, sum prentar Bíbliur, bíbliupartar og kristnan lesnað og roynir at spreiða evangeliið á tann hátt. Hann er farin heim aftur til Týsklands, men ferðast javnan til londini í Asia at halda ráðstevnur og fundir, har hann greiðir frá, hvussu týdningarmikið tað er at týða Bíbliuna, bíbliupartar og kristnan lesnað til øll mál og at breiða hetta út.

Hann greiðir soleiðis frá: „Eg hevði verið á einari ráðstevnu og skuldi heim aftur. Tá ið eg kom á flogvøllin og sá øll hesi fólkini, hugsaði eg: „Hvussu kanst tú luta Guds kærleika til hesi fólkini, sum hava slíkan skund og ikki vilja, at nakar skal órógva tey?"

Eg fór umborð á flogfarið og kom at sita undir liðini á einum jøda, sum ikki var trúgvandi.

Hann tók sjálvur stig til eina samrøðu. Tað riggaði so væl okkara millum, so vit prátaðu saman á næstan allari ferðini, sum vardi í ellivu tímar.

Hann vildi fegin hoyra, og eg segði honum, hvussu mektigur Ábrahams Gud er, tá ið vit fáa eitt persónligt samband við Hann. Vit tosaðu um, at Gud hoyrir, tá ið vit tosa við Hann, og Hann talar eisini til okkara. Hann ger enn undur. Eg fekk eisini sagt honum um partar av mínari gonguferð saman við Harranum, og hvussu eg havi upplivað, at Hann svarar bønum okkara. Vit tað at hann eisini hevði nakrar heilsutrupulleikar, so bóðu vit saman og bóðu Jesus møta honum og grøða hann. Áðrenn vit fóru hvør til sín, fingu vit telefonnummarið hjá hvør øðrum, og eg eri vísur í, at Harrin vil møta hesum persóni á ein ella annan hátt í lívinum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ríkasti maðurin

Einaferð var tað ein ógvuliga ríkur góðseigari, sum átti bæði gull og grønar skógir. Ein dagin, tá ið hann spákaði sær ein túr á ogn síni, sá hann ein grótsmið, sum sat og høgdi grót, meðan hann sang av fullum huga.

„Hvat er tað, sum gleðir teg?" spurdi góðseigarin.

„Jú, eg eigi ein pápa í himli, og dagligt breyð eigi eg eisini. Skuldi eg so ikki verið glaður?" spurdi grótsmiðurin.

„Men tú noyðist jú at streva og stríða," segði góðseigarin.

„Ja, í sveitta andlits tíns skalt tú eta breyð títt," segði grótsmiðurin, „og eg havi heilsuna og eri væl hýrdur. Tað er nógv at siga takk fyri."

„Men tú manst ikki vinna meira pening enn frá hondini og inn í munnin?" segði góðseigarin.

„Jú, men Jesus hevur sagt: „Tit mugu ikki stúra fyri degnum í morgin," svaraði grótsmiðurin, „og um eg eri trúgvur í mínum arbeiði, so leggur hann sína signing til."

Góðseigarin var ofta í ringum lag, tí hann stúrdi mangan so fyri einum og so fyri øðrum, viðhvørt var tað neyðugt, men ofta óneyðugt, og mangan mátti hann í undran hugsa um grótsmiðin, sum var so nøgdur, og góðseigarin var næstan øvundsjúkur inn á hann.

Eina náttina droymdi góðseigarin, at hann hoyrdi eina rødd, sum segði við hann: „Í nátt skal ríkasti maður í sóknini doyggja!"

Hann vaknaði ræðslusligin, tí hann visti jú, at eingin í sóknini var ríkari enn hann, og hann sendi beinanvegin boð eftir læknanum. Hann kom og kannaði góðseigaran, men fann ikki minsta tekin til nakra sjúku.

„Tað mugu vera nervarnir," segði læknin. „Tygum eru so púra frískur; men tað er ikki gott at hava so nógv um at vera. Farið ein túr út til havið og hvílið tygum."

Dagin eftir hoyrdi góðseigarin, at grótsmiðurin var deyður. Hesin ríki maðurin gjørdist ógvuliga bilsin; men nú skilti hann týdningin av teimum orðunum, hann hevði hoyrt um náttina.

Ríkasti maðurin, er ikki tann, sum eigur mest av jarðarinnar góðsi, men tann, sum er ríkur í Gudi.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ein dag í senn

Hon var vorðin einkja og sat eftir við einum flokki av smábørnum. Og tey tímiligu korini vóru eisini smá. Men hon helt seg flótandi, og tað gekk ár undan ári. Ein dagin spurdi ein gomul vinkona hana, hvussu tað hevði gingist øll hesi árini, hon hevði verið einkja.

Tá smíltist hon og segði: „Á, eg havi bara verið einkja ein dag í senn.“

Vinkonan hugdi spyrjandi at henni. Tá segði hon: „Tá ið maður mín doyði, vildi tann hugsanin tyngja meg til jarðar, at eg nú skuldi vera einsamøll í lívsins bardaga. Men so mintist eg á orð Jesusar: „Verið ikki stúrnir fyri degnum í morgin!“ Hvønn morgun havi eg hugsað um hetta og roynt at gjørt skyldu mína ein dag í senn. Og soleiðis hevur gingið, við Guds hjálp.“

*Effie Campbell* umsetti.

# HVAT ER HÆGSTA YNSKI TÍTT?

Ofta verða vit spurd, tá ið vit hava føðingardag ella onkran merkisdag: „Hvat ynskir tú tær?“

Men okkurt er størri enn merkisdagar, og tað er sjálvt lívið. Vit áttu øll at spurt: „Hvat ynski eg mær úr lívinum?“

Dávid kongur svarar hesum spurningi í Sálmi 27,4: „Um eitt havi eg biðið Harran, tí trái (ynski) eg eftir: At eg skal sleppa at búgva í húsi Harrans allar dagar mínar, til at skoða, hvussu lívsælur Harrin er, og grunda í templi Hansara.“ V.D.

Eg hugsi ikki, at nóg stórur dentur kann leggjast á hetta ynski hansara: **AT LIVA Í GUDS NÆRLEIKA ER MÍTT HÆGSTA YNSKI.**

Vit kunnu og skulu hava mong ynski fyri lívið. Men mítt **HÆGSTA YNSKI** má og skal vera **AT LIVA GUDU NÆR.** Sálmaskaldið Ásaf sigur í Sálmi 73,28: **MÍTT GÓÐA (MÍN LUKKA) ER AT VERA GUDI NÆR.**

*Moses Hansen – Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 10. mai | **Tekstur:** | Dán. 1,18-20; 3,1-30 | **Bíbliuorð:** | 2 Mós. 20,3 |
| 17. mai | **Tekstur:** | Jóh. 14,1-3; Mark. 16, 19-20 og Matt. 24, 30-31 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 14,2a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74